# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingar til Bráðfeingisdeildina G1 (fyrst og fremst til kommunulæknatænastuna og skaðastovu/móttøkuna - endurlýsing)

Í samband við, at nýggja vaktarskipanin fyri kommunulæknar byrjar á Landssjúkrahúsinum, verður søkt eftir fýra sjúkrarøktarfrøðingum á ymsum brøkum, har møguleiki er at áseta arbeiðsbrøkin, heilt niður í 0,3.
Arbeiðið er í fyrstu syftu til kommunulæknatænastuna og skaðastovu/móttøkuna til setan 1. mars 2007 ella skjótast gjørligt.

**Deildin umfatar**

- vaktarskipan fyri kommunulæknar í tíðarskeiðinum kl. 16.00-08.00 allar dagar umframt dagtímarnar í vikuskiftum
- skaðastovu
- bráðfeingis móttøku
- dagskurð
- viðrakning
- intensiv

Í tíðarskeiðnum frá 16.00-24.00 allar dagar, skal ein sjúkrarøktarøktarfrøðingur verða knýttur at kommunulæknatænastuni. Í vikuskiftunum verður tað eisini í tíðarskeiðnum 08.00-16.00. Tað verður í fyrstu atløgu ongin sjúkrarøktarfrøðingur knýttur at kommunulæknaskipanini um náttina.

G1 er ein heild við fleiri ymiskum funktiónum, og starvsettu koma eftir tørvi at hava ymiskar arbeiðsuppgávur á deildini, tó fyrst og fremst innan vaktarskipanina fyri kommunulæknar og hareftir skaðastovuna/móttøkuna.

Kommunulæknavaktin á Landssjúkrahúsinum er nýskapað og umfatar miðstaðarøkið, tvs. Streymoy, Eysturoy, Vágoy, Norðoyggjar, Nólsoy, Hestoy, Koltur, Dímun og Mykines. Seinni verður skipanin møguliga víðkað.

**Arbeiðsøkið í høvuðsheitum**
Arbeiðsøkið til hesi størv umfatar í høvuðsheitum móttøku, observatión og sjúkrarøkt til sjúklingar, ið seta seg í samband við kommunlæknavaktina, koma á skaðastovuna og í bráðfeingis móttøkuna, umframt at hjálpa kommunulæknanum við kanning og viðgerð.

**Vit kunnu bjóða**

- innleiðslu og upplæring
- fjølbroytt arbeiði og nógvar avbjóðingar
- gott og positivt arbeiðsumhvørvi

**Krøv til umsøkjarnar**

- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga í móttøku, observatión, kanningum, viðgerð og røkt av sjúklingum við bráðfeingis tørvi og minst 2 ára royndir frá medisinskari og/ella kirurgiskari seingjardeild
- fleksibilitetur og góð samstarvsevni
- opin og jalig/ur
- vil søkja mennandi avbjóðingar
- má kunna arbeiða í skiftandi vaktum, tó mest kvøldvaktir og vikuskiftisvaktir
- teldukunnleika á brúkarastøði
- má kunna arbeiða sjálvstøðugt

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava**

- arbeiðsroyndir hjá kommunulækna ella líknandi fakliga breiðar royndir
- fakligar royndir við at móttaka, observera, kanna, viðgerða og røkta sjúklingar við bráðfeingis tørvi

**Lønar- og setanartreytir** sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar

**Nærri fæst at vita** um størvini við at ringja 304500 til Margit Stórá, deildarleiðara á G1, lokal 5811, t-post mast@lsh.fo ella til Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, t-post naina@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 19. februar 2007 kl. 12.00

## Bioanalytikarar

Rannsóknarstovan á Landssjúkrahúsinum søkir eftir einum heiltíðar bioanalytikara til fast starv frá 1. apríl 2007. Royndir innan patologi er ein fyrimunur, men ikki krav.

Eisini eru nøkur avloysarastørv í tíðarskeiðnum 1. mei til og við 30. september 2007 leys at søkja.

Avloysarastørvini kunnu vera alt tíðarskeiðið ella eftir avtalu.

Rannsóknarstovan húsast í nýggjum hølum, hevur góðar arbeiðsumstøður og er eitt integrerað laboratorium, har øll 5 serøkini innan bioanalytikarafakið er umboðað, umframt ambulatorium á Landssjúkrahúsinum og á læknamiðstøðini í Runavík.

Í løtuni starvast vit 20 bioanalytikarar, 2 skrivarar og 1 hjálparfólk. Allir bioanalytikararnir skifta millum tey ymisku serøkini.

**Førleikakrøv**

- bioanalytikaraútbúgving
- góð samstarvsevni og fleksibilitetur

**Lønar- og setanartreytir** samb. sáttmála millum Bioanalytikarafelagið og Fíggjarmálaráðið

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Ivy Hansen, leiðandi bioanalytikara, lokal 5601 ella t-post ivyh@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 16. mars 2007 kl. 12.00

## Læknaskrivari - endurlýsing

Á Skurðdeplinum er eitt starv sum læknaskrivari ¾ tíð ella meira leyst at søkja til setan 1. apríl 2007 ella eftir avtalu.

Hetta er eitt nýtt starv við høvuðsuppgávum á Skurðdeildini. Sum tann fyrsti læknaskrivari við hesari funktión hevur tú stóran møguleika at seta tína ávirkan á gerandisdagin.

Tú verður eisini ein partur av einum toymi av skrivarum, ið til tíðir fara at skiftast um at hava ymiskar funktiónir á Skurðdeildini og á skrivaragongini.

Á Skurðdeplinum eru 14 skrivarar.

**Førleikakrøv**

- útbúgving sum læknaskrivari
- tænastusinni
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- teldukunnleiki
- fyrikomandi og fleksibul

**Lønar- og setanartreytir** smb. sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Helenu Gerfort, leiðandi læknaskrivara, lokal 5105.

**Umsóknarfreistin** er 19. mars 2007 kl.12.00

## Onnur størv

**Starvsfólk til Psyk. D2**
Umsóknarfreistin er 5. februar 2007 kl. 12.00
sí meira á www.lsh.fo

**Læknaskrivari sum avloysari á Med.**
Umsóknarfreistin er 15. februar 2007 kl. 12.00
sí meira á www.lsh.fo

**Avloysari fyri yvirlækna til Anestesideildina á Bráðdeplinum**
Umsóknarfreistin er 5. mars 2007
sí meira á www.lsh.fo

**Introduktiónsstarv í Almen medisin**
Umsóknarfreistin er 28. februar 2007
sí meira á www.lsh.fo

**Starvsfólk til Sjúkraflutningstænastuna**
Umsóknarfreistin er 9. februar 2007
sí meira á www.lsh.fo

**Húsavørður**
Umsóknarfreistin er 9. februar 2007
sí meira á www.lsh.fo

Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið, Lønar og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

Landssjúkrahúsið er meginsjúkrahús Føroya við umleið 20 serlæknaøkjum og 200 seingjaplássum. Tilsamans starvast yvir 800 fólk á Landssjúkrahúsinum, og endamál okkara er at bjóða føroyingum eina góða heilsutænastu á so nógvum økjum sum gjørligt.

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo